# Tarira fær rós í Álandi

**Kórið Tarira fær í blaðgrein í blaðnum Åland rós, eftir at kórið og leiðarin Sunleif Rasmussen hava framført í Álandi**

KÓRTÓNAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Tann 24. mars hevur Peter Lång umrøðu av konsert, sum føroyska kórið Tarira hevði í Jomalakyrkjuni á Álandi. Greinin er í blaðnum Åland.

Mett verður vert at nevna konsertina við Føroya fremsta kamarkórið, tí Áland nýtir ofta Føroyar at javnmeta seg við, tá um mentan ræður. Spurt verður fyrst, hvussu nógvar symfoniir eru skrivaðar Álandi? Svarið fáa vit í endanum av greinini.

Síðani verður greitt frá um kórleiðaran Sunleif Rasmussen, um tónleikaprísin frá Norðurlandaráðnum í 2003, um symfoniina Oceanic Days og um føroyskt tónleika- og mentanarlív sum heild, har støðug framgongd er at sjá, eisini á politiska viljanum og á fíggjarjáttanum, sum hevur havt við sær ríkt tónleikalív innan musikkskúla og at tjóðpallur við føstum sjónleikarum nú hevur latið dyrnar upp.

### Frumframførsla

Lång peikar á, at danska úrvalskórið Art Nova hevur vitjað Áland fyri kortum og fegnast hann tí um vitjanina frá úrvalskórinum Tarira, sum prógvar, hvat kann koma burturúr, tá dentur verður lagdur á góðsku.

Kórið hevði álendska frumframførslu á skránni. Kjell Frisk hevði spælt sær við breiðum penslum og latið hugflogið flogið kring tekstin Herrens Bøn. Úrslitið eru tættir harmoniir. Tó krevst eitt kór sum Tarira, um verkið skal ljóma heiðurliga, sigur Peter Lång.

Og hann nevnir eisini áttaræddaðu útsetingina hjá Bjarna Restorff av sama verki, sum eisini rørdi við ummælaran og fekk hann út á ævintýr í huganum.

Ein sera væl samansett konsert, staðfestir Peter Lång á blaðnum Åland. Og svarið upp á spurningin í byrjanini er, at symfoni nummar tvey eftir Lars Karlsson er framførd í Uleåborg. Ríkismiðlarnir gjørdu fitt burturúr, men heima í Álandi tykist hendingin vera farin ómerkt framvið, harmast Peter Lång.

# Inniligt og andaligt

**Friðsælan valdaði í Vesturkirkjuni sunnukvøldið. Kertuljósini bleiktraðu og andaligheitin hekk tjúkk í luftini. Og andalig er orðið, sum best lýsir framførsluna hjá kórinum Tarira. Føði fyri sálina av tí góða slagnum**

KONSERT
*Niels Uni Dam*



Tarira er júst heimafturkomin av konsertferð. Konsertskráin í Vesturkirkjuni var tann sama, sum sviar, álendingar og danir hava upplivað.

Tá kór hjá Sunnleifi Rasmussen syngja, veist tú, at tú kanst vænta høga góðsku, men eisini okkurt forkunnugt og ofta avbjóðandi kórsang. Tarira er eitt kór við ótrúliga dugnaligum sangarum. Sangarar sum eru kendir úr føroyska kórheiminum, og sum saman borga fyri framførslum í serflokki. Framførslan sunnukvøldið var einki undantak.

Deknurin legði fyri við at lesa burtur úr Sálmi 103 í Gamla Testamenti, tá knappiliga friðsælan var skrødd sundur av einari fartelefon. Lukkutíð at hetta ikki hendi meðan kórið sang. Sjálvt um summi høvdu hug at ilskast eitt sindur, vóru allar illar kenslur skolaðar burtur, tá kórið sang fyrstu tónarnar av »Nun lob, mein Seel; den Herren / Lover nu Herren« hjá Kára Bæk. Áhoyrarnir vórðu fyltir av einari kenslu, sum bert kann lýsast sum andalig.

Kórið var í svørtum búnum, sum Anna Kristin Bæk hevur sniðgivið. Búnarnir eru gjørdir til hesa konsertferðina, og klæddu væl til konsertskránna. Skráin var sera væl gjøgnumhugsað, og løgini klæddu Vesturkirkjuni væl. Har var nýtt og gamalt og nógv føroyskt.

»Slóttumenn« hjá Vagn Holmboe og Williami Heinesen var fyrsta hæddarpunktið. Lagið er pompøst, so hárini á arminum reisa seg. Tú vart tikin við í hesa uppliving, og kórið sang sum einglar, daprir einglar.

Størsta hæddarpunktið á kvøldinum var »Pater Noster« hjá Bjarna Restorff. Framførslan av hesum torføra lagi var einki minni enn ófatilig. Tann ótrúliga mongdin av frálíkum røddum blakaðu eina inniliga sansa- og ljóðuppliving í andlitið á bergtiknu áhoyrarunum. Tá aftur var kvirt, sessasist kórið. Deknurin læs 33 sálm í Gamla Testamenti.

Fyrsta lag eftir steðgin var »Mørket taler til den blommande busk«, ein svensk tolking av einari yrking hjá Williami Heinesen, sum Pauli Hansen hevði gjørt til kór. Ein sera góð byrjan, og soleiðis helt konsertin fram. Tá seinastu tónarnir vóru tagnaðir, mundu klappini ongan enda taka. Tarira hevði borðreitt við kórsangi í heimsflokki, og meira enn hálvfulla Vesturkirkjan gav okkum teir fullkomnu karmarnar til konsertina.

### Konsertskrá hjá Tarira

Nun Lob, Mein Sein, Den Herren/
Lover nu Herren Kári Bæk
Herrens Bøn Kjell Frisk
Náttarfriður Goethe/J.H.O. Djurhuus / Pauli í Sandagerði
Slóttumenn William Heinesen / Vagn Holmboe
Gras William Heinesen / Vagn Holmboe
Dimmið Christian Matras/ Vagn Holmboe
Pater Noster Bjarni Restorff
Mørket taler til den blommande busk William Heinese / Pauli Hansen
Kvøldvísa um summarmála S.H. Grímsson / Sunnleif Rasmussen
Blátt Steinbjørn B. Jacobsen / Sunnleif Rasmussen
Skærur vindur Rói Patursson / Sunnleif Rasmussen
Døgg Karsten Hoydal / Sunnleif Rasmussen
En ny Himmel Och en ny Jord Johannes Opinbering / Svend David Sandstrøm